

# Erik Lervig skal stjórna Eysturkommunu

**Bygdaráðini í Gøtu- og Leirvíkar kommunu hava sett Erik Lervig sum kommunustjóra í Eysturkommunu**

KOMMUNUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Eysturkommuna fer formliga at virka frá 1. januar 2009, og ein av fyrstu uppgávunum hjá kommunustjóranum verður at fyrireika og fremja samanleggingina av umsitingunum í verandi kommunun og at skipa ein bygnað fyri Eysturkommunu, skrivar www.gota.fo

Erik Lervig er 38 ára gamal, hevur bankaútbúgving frá Føroya Banka og siviløkonomútbúgving frá Handilsháskúlanum í Sønderborg.

Erik Lervig hevur royndir sum fulltrúi frá Toll og Skatt, grannskoðari hjá Landsgrannskoðaranum, og síðani 2000 hevur hann verið fíggjarleiðari hjá IRF, har hann eitt nú eisini hevur havt ábyrgdina av umsitingini og starvsfólkamálum.

Erik Lervig byrjar í starvinum sum kommunustjóri í Eysturkommunu tann 1. august 2008.

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperative

## P/F Bátatænastan flytir í nýggj og størri høli í Álakeri

Í hesum sambandi verður søkt eftir:

### BÓKHALDARA/HJÁLPARFÓLKI

at byrja sum skjótast ella í seinasta lagi 1. august 2008.
Starvið umfatar eisini avgreiðslu o.a. í handlinum

**Starvið**
Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðheitum:
- vanligt bókhaldsarbeiði
- skrivstovuavgreiðslu,
- avgreiðslu í handlinum

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður er álítandi og fyrikomandi. Fyrimunur er um umsøkjarin hevur royndir við Navision fíggjarskipanina.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal:
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava góð samstarvsevni
- hava telduførleika

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu

**Arbeiðstíð**
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

### VERKFØRARA

at byrja sum skjótast ella í seinasta lagi 1. august 2008.

**Starvið**
Viðkomandi skal hava ábyrgdina av verkstaðnum v.m.
Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt arbeiði.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal:
- verða maskinmeistari ella -smiðjur
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava góð samstarvsevni
- hava telduførleika
- hava koyrikort

Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt arbeiði, har tú sjálvur kemur at seta dám á tín dag. Roknast skal við víðariútbúgving uttanlanda v.m.
Lønin verður sett eftir nærri avtalu.

**Arbeiðstíð**
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til SPEKT. Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. juli 2008.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Birgir Johannesen á telefon 21 38 35 ella Árna Ellefsen á telefon nr. 23 34 84.

*Bátatænastan varð stovnað í 1993. Í fyritøkuni starvast í dag 4 fólk, og hesi syrgja fyri at veita útróðra- og bátafólki í Føroyum eina góða tænastu. Bátatænastan umboðar m.a. Volvo Penta báta motorar, Mariner uttanborða motorcar og bátar v.m. Úrvalið hjá Bátatænastuni er í dag so stórt, at so at siga alt innan bátaútgerð fæst.*

SPEKT stataut. revisorar Spf.
spekt@spekt.fo, www.spekt.fo

Staravegur 17, Postsmoga 3258
110 Tórshavn,
Telefon 34 34 34, Telefaks 34 34 35

Heiðavegur 15, Postsmoga 190
600 Saltangará,
Telefon 474 474, Telefaks 474 475

# Plakat við handstavraðnum

Nú ber til at seta teknmál á veggin. Tí Føroya Skúlabókagrunnur hevur prentað fyrstu føroysku plakatina við einum fulfiggjaðum føroyskum handstavraði.

Teknmálsplakatin knýtir seg til bókina Hervør og Høgni í triðja, ið sum heiti bendir á, er lesibók til triðja flokk í føroyskum. Umframt teknmálsplakatina, er eisini annað tilfar, so sum arbeiðsbøkur, lærara- og foreldravegleiðingar, gjørt til bókina.

Plakatin og bøkurnar fáast á Bókamiðsøluni og í bókabúðum kring landið.

Fyri Føroya Skúlabókagrunn hevur Marjun Ziskason, ritstjóri, havt útgávurnar um hendi.

Kelda: http://www.birkblog.blogspot.com/




*Fyri Skúlabókagrunnin hevur Janus Dam Guttesen teknað fyrsta føroyska handstavraðið*

*Mynd: Birgir Kruse*

